## Ferð um Skopunarfjørð eftir MjúS

**Siglt verður um Skopunarfjørð eftir MjúS festivalin**

FESTIVALUR

Tann stóri spurningurin seinastu dagarnar hevur verið: Sleppa fólk norður aftur um Skopunarfjørð eftir MjúS? Og svarið er »Ja!« - tað slepst norðuraftur!

Teistin ger ein eykatúr eftir at tónleikurin á stóra pallinum er av, og skjóttgangandi báturin Silja fer at sigla um Skopunarfjørð frá klokkan 05 um morgunin - eftir at bál og dansur eisini eru av.

Sjálvandi ber eisini til at sova í Sandoynni. Antin í egnum tjaldi, ella í einum av bygdarhúsunum í oynni.

Bussar verða av Sandi til Skopunar, og eisini á Gomlurætt.

Upplýsingar finnast annars á www.tonlist.fo og fáast við at ringja til kunningarstovuna, sigur Sandoyar Kunningarstova.

## Gestir á skránni hjá MjúS

**Gestir, ið ikki hava vitjað almennu føroysku tónleikagáttina serliga nógv seinasta árið, vera við á MjúS leygardagin 25. juni**

FESTIVALUR

Gestir kunnu uttan iva sigast at vera eitt av mest spennandi føroysku tónleikanøvnunum í løtuni. Síðan Gestir komu á vitjan fyrstu ferð á heysti 2002, hava teir m. a. vunnið Prix Føroyar, spælt á trimum útlendskum festivalum, verið í stásiligu Lundgaard Studios í Danmark, og í fjørheyst høvdu teir konsert á kanska best dámda spælistaðnum í Keypmannahavn, Vega.

Í heyst skulu Gestir aftur spæla á Vega og í studio Lydhoer.dk hevur lýst sermerktu tekstirnir, huglagið og ikki minst røddina, ið mynda tónleikin hjá Gestir, sum »Sigur Rós - bara við meira kanti«. Onnur tætt skyld nøvn, ið kunnu nevnast, eru Jeff Buckley, Peter Gabriel, Coldplay, the Smiths og Radiohead. Tað er greitt, at Gestir eru nakað serligt.

– Viðmerkjast skal harafturat, at framførslan hjá Gestum á Sandi verður enn meiri spennandi enn vanligt. Gestir spæla hesaferð uttan trummaleikara. Hvussu hetta fer at eydnast, er bert ein máti at vita, siga fyrireikararnir.

## Tónleikavitjan úr Løgumkloster

**Í døgunum 26. juni til 3. juli vitjar Løgumkloster Spillemandslaug Føroyar**

KONSERTIR

Vanliga nevna tey seg »Tante Tuttes Knævarmere«, og spæla tey lættari spælimanstónleik.

Ferðin í Føroyum er fyrst og fremst fyri at uppliva, havt vit kunnu bjóða teimum sum ferðamannaland.

Kortini fara tey - ókeypis – at spæla nakað fyri okkum.

Mánadagin 27. juni spæla tey uttan fyri Kunningarstovuna í Klaksvík kl. 16.30.

Mikudagin 29. juni spæla tey í Grasagarði í Havn kl. 16.00.

Møguliga kann hetta verða flutt til Gongugøtuna við Sparikassan.

Sama kvøld spæla tey á Hotel Føroyum frá kl. 21.30

Fríggjakvøldið 1. juli spæla tey í Matsovuna Casa Blanca í Saltangará, og leygarkvøldið 2. juli spæla tey í Mentannarhúsinum í Fuglafirði ikki so seint.

Nærri verður kunngjørt um klokkutíðir seinni.

Bólkurin býr í Skótahúsinum á Kambsdali .

Tey koma umframt at ferðast rættuliga nógv kring oyggjarnar.

Meira fæst at vita um teirra tónleik á www.oester-hoejst.dk

Við at klikkja á Foreninger.



*Um mánaðarskifti fara hesir ungu leikarnir úr Nólsoyar Barnasjónleikaraskúla at luttkaka á stórari H.C. Andersen sjónleikarastevnu í Slagelse*

# Nólsoyarbørn á H.C. Andersen sjónleikarastevnu

**Um mánaðarskiftið fer Nólsoyar barnasjónleikaraskúli at luttaka á stórari H.C. Andersen sjónleikarastevnu í Slagelse**

SJÓNLEIKUR

*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

MáF, Meginfelag áhugaleikara Føroya, hevur nógv jørn í eldinum. Herfyri frættist, at felagið í næstum sendir 10 ungir klaksvíkingar á sjónleikarastevnu í Litava. Og nú er túrurin so komin til børn í Nólsoy. MáF hevur nevniliga eisini skipað fyri, at ein bólkur av barnasjónleikarum úr Nólsoy verður við á stóru H.C. Andersen sjónleikarastevnuni, ið byrjar í Slagelse 27. juni. Átta bólkar verða við, og eru teir úr Danmark, Noregi, Finlandi, Føroyum, Letlandi, Litava og Kuba. Børnini eru 9-16 ára gomul.

Bólkarnir koma við einum sjónleiki hvør, ið er inspireraður av ævintýrum H.C. Andersens. Sjónleikin hava allir bólkarnir gjørt í vár, teir hava havt frumsýningar, og nú eru ungu sjónleikarnir so klárir til stóru stevnuna.

### Eldsálir

Í Nólsoy hava tey spælt sjónleik, síðan Bygdarfelagið Royndin stovnað í 1918. Barnasjónleikaraskúlin byrjaði virksemi sítt seinast í 80'unum. Seinastu 5 árini hevur kommunan goldið til skúlan, men nógv av arbeiðinum er sjálvboðið. Í løtuni ganga 22 børn og ung á skúlanum.

Tað eru eldsálirnar í Nólsoy, Gunnvør og Hilmar Joensen, ið fara við Nólsoyarbørnum til Slagelse, hon sum leikstjóri og hann sum ljós- og ljóðmaður og sum tónleikari. Foreldur hava saman við Gunnvør og Hilmari seymað búnar og gjørt pallmynd.

H.C. Andersen sjónleikarastevnan í Slagelse byrjar alment við einum stórum gøtusjónleiki týsdagin 28. juni, og kl. 14.30 fríggjadagin 1. juli spæla Nólsoyarbørn á Slagelse Teaters lille scene.

# Njótið náttúruna í Vágum

**Í Vágum eru bestu møguleikar í landinum til sílafisking. Tað er bara at finna tráðuna fram og taka sær tíð til at slappa av í náttúruni eina løtu**

SÍLAFISKING

– Njótið frítíðina í vøkru náttúruni í Vágum. Slappið av við størsta vatnið í landinum. Finnið sílatráðuna fram og takið nakrar tímar úr strongda gerandisdegnum.

Soleiðis heldur Kunningarstovan í Vágum, at ein av bestu háttunum at slappa av uppá er - at seta seg við eini sílatráðu við eitt av vøkru vøtnunum, sum enn standa órørd mannahondum.

Eitt teirra er Føroya størsta vatn, Sørvágsvatn ella Leitisvatn, alt eftir, hvørju megin tú situr. Vanliga bert nevnt Vatnið.

– Her er friðaligt, um farið verðurt sindur burtur frá landsvegnum, har túsund bilar dagliga strúka fram við út á tann pulserandi flogvøllin. Men bara einar tíggju, fimtan minuttir til gongu suður frá Gróthústanga ella flúgvarabedingini er friðurin eins og fólk ongantíð hevði sett her í námind.

– Og sílini eru nógv og bíða bert eftir tær. So tað, sum um ræður, er at finna tráuna fram og støkka inn á



gólvið við kunningardiskin á flogvøllinum at keypa tær eitt fiskikort, sum gevur rætt til at fiksa á vøtnunum í Vágum. Fiskikortini kunnu keypast fyri ein dag, eina viku ella alt árið í senn, sigur Kunningarstovan í Vágum.